# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800



www.sansir.fo

SKRIVARI TIL
SENDISTOVU FØROYA Í BRÚSSEL

Vit søkja við hesum eftir skrivara til sendistovu Føroya í Evropa-samveldinum (Brússel) at seta frá 1. november 2006 ella skjótast til ber.

Sendistovan røkir føroysk áhugamál í Evropasamveldinum.

**Uppgávur**
Tann, ið settur verður, verður partur av dagligu arbeiðsgongdini í sendistovuni. Starvið fevnir millum annað um telefonmóttøku, skjalaskráseting, brævasamskifti, praktisk viðurskifti á sendistovuni, at røkja heimasíðuna o.t.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving. Umsøkjarar við viðkomandi arbeiðsroyndum kunnu eisini søkja. Dentur verður lagdur á góðan málkunnleika, bæði í skrift og talu, serliga føroyskt, enskt, umframt franskt. Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevnir, vera hjálpsamir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

**Starvsstaðið**
Starvsstaðið verður sendistova Føroya í Evropa Samveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovan er skipanarliga samrunnin partur av Løgmansskrivstovuni.

**Setanartreytir**
Starvið er fulltíðarstarv og er skipað samsvarandi teim reglum, sum eru galdandi í donsku uttanríkistænastuni fyri lokalsett starvsfólk. Bústaðarviðurskifti eru ábyrgd umsøkjarans.

Gjøllari upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, á telefon 351077 ella (+ 32) 22 33 08 55 ella Jeanette E. Blåsvær, ráðgeva á telefon 351042.

**Umsóknir**
Vinarliga sendið umsókn við prógvum, lívrensli o.ø. til Løgmansskrivstovuna, Tinganes, 100 Tórshavn ella á teldupostadressu: info@tinganes.fo.

Umsóknir skulu verða Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 26. september 2006.

Løgmansskrivstovan styðjar løgmann í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

## Neil's Band á pall hjá Thomsen



### Fríggjakvøldið fara Neil Joensen og vinfólk á pall á Tvøroyri

TÓNLEIKUR

Neil Joensen kenna tey flestu frá samstarvinum við Guðruna Sólju Jacobsen. Og seinni eisini frá samstarvinum við bróður Guðruna, Eyðun Ásason. Saman hava Neil og Eyðun spælt sera nógv, mest í Havnini síðstu tíðina.

Men Neil er eisini partur av manningini í bólkinum Blanding, og tað er stórur partur av hesi manning, sum fríggjakvøldið fer á pall hjá Thomsen á Tvøroyri undir heitinum Neil's Band.

Neil's Band fer at leika góðan café-tónleik, ið hóskar væl til hugnaliga umhvørvið í Pubbini hjá Thomsen.

Zero Magazine:

## Gestir eru strálandi

Fyri stuttum fekk fyrsta fløgan hjá føroyska rokkbólkinum Gestir gott ummæli í Danmark frá musik.dk, og nú fær útgávan eisini gott ummæli í Svøríki. Svenska Zero Magazine hevur ummælt fløguna "Burtur frá toftunum", og niðurstøðan er greið: Fløgan er strálandi. Gestir fáa 8 stig út av 10 fyri fløguna, ið sum heild verður lýst at vera nýskapandi og hugtakandi. Ummælarin leggur dent á sangin á føroyskum og røddina hjá Ólavi sum eina av dygdunum. Tónleikurin verður lýstur sum dramatiskur og rokkutur í stíl við svensku Kent og spennandi og skiftandi í stíl við ensku Radiohead - men samanhangandi eru eisini føroysku náttúrumyndirnar, ið tónleikurin endurspeglar, sigur ummælarin. Ummælarin metir, at ljóðmyndin møguliga kundi verið eitt sindur greiðari, men somuleiðis, at hetta ikki bilar so nógv, í mun til hvussu góð fløgan er. Fløgan ljóðar væl og gevur íblástur. Hon gevur einum hug at keypa sær ferðaseðil út í Norðuratlantshavið, endar ummælarin. Les ummælið á zeromagazine.nu/rec.asp?id=1396

**nud**

artharmonia
einarsson & olsen
serlæknavirki í plastikskurðfrøði

**Bíleggingar um viðtalu** kunnu gerast við at ringja til Klaksvíkar Sjúkrahús yrkadagar kl. 9.00 - 12.00 á telefon 454545.

TEAM85

Artharmonia er nýstovnað klinikk, har virkisøkið er "rekonstruktiónskirurgi", vanliga nevnt plastikkirurgi. Føroyskir og íslendskir serlæknar hava stovnað hetta samtak, ið hevur sum endamál at fremja ymiskar serskurðviðgerðir í Føroyum. Talan er um rekonstruktiónskirurgi á ymsar partar á kroppinum, t.d. andlit, hendur og viðfødd brek, umframt fylgjur eftir skaða - samanumtikið kallað lýtisskurðviðgerðir. Sí www.lytalaeknir.is.